# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Mótsetningar hittast

Mundi tað vera lagnunnar speisemi, at nærum sama dag sum mótsetningarnir Høgni Hoydal og Bjørn Kalsø vunnu spurnarkappingina í Útvarpinum, fingu vit tveir nýggjar kandidatar til næstformanssessirnar í Tjóðveldis/Sambandsflokkinum, nevniliga "mótsetningarnar" Tórbjørn Jacobsen og Johan Dahl.

Tað er eingin loyna, at júst hesir báðir eitt nú í búskaparpolitikkinum eru sera samdir og ynskja Fólkaflokkin, har piparið grør. Kanska samanssetingin av vinnaraliðnum í spurnarkappingini tí er ein ábending um eina møguliga komandi samgongu.

Undan seinasta formansvali í Sambandsflokkinum kom tíðuliga til sjóndar, at Johan Dahl vongurin í mongum er sera ónøgdur við samstarvið við Fólkaflokkin og lutvíst við Javnaðarflokkin við Jóannesi Eidesgaard á odda. Tá var nevniliga róð framaundir eina heilt nýggja samgongu eftir komandi val millum Sambandsflokkin og Tjóðveldisflokkin.

Onkur vil kanska halda, at tað ber ikki til at sameina so stórar mótsetningar heldur enn eld og vatn. Men hetta er jú roynt áður. Vit høvdu eina samgongu millum Tjóðveldisflokkin og Sambandsflokkin frá 1989 til 90. Einki er forgjørt í politikki, og hví skuldi tað ikki kunnað hent aftur. Ikki minst nú flokkarnir báðir fáa tveir næstformenn, sum helst "draga somu línu" . Vit loyva okkum at gita, at hesir báðir verða valdir at standa sínum formonnum við lið uppundir komandi val.

Vit hava áður á hesum stað gitt og mett um henda møguleika, nettupp tí kreftir eru í flokkunum báðum, sum síggja slíka samgongu sum besta boð eftir valið. At hesar kreftir nú bráddliga kunnu fáa enn størri ávirkan í flokkunum sum næstformenn kann vera ein ábending um, hvat vit kunnu vænta eftir eitt komandi val.

Vit kunnu í hvussu er staðfesta hetta: Tjóðveldisflokkurin vil fyri alt í verðini sleppa burtur úr oyðimarkargongdini, og tað er væl skiljandi. Og tá lítið røkist fyri, at Fólkaflokkurin fer í samgongu við Tjóðveldisflokkin aftur í bræði, og kemi in millum Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin neyvan er hin besta, so er ikki óhugsandi, at Tjóðveldisflokkurin fyri at koma innaftur í hitan, sær Sambandsflokkin sum kanska tann einasta møguleikan.

Vilja Tjóðveldismenn veruliga sleppa í eina ella aðra samgongu, so verður tað tó ikki uttan trupulleikar við verandi formanni. sum slættis ikki altíð hevur víst líka gott handalag, tá tað ræður um samstarv. Um tað verður lættari við einum Tórbjørn Jacobsen við hansara lið fer tíðin at vísa. Áhugavert verður undir øllum umstøðum at fylgja næstformansvalunum komandi vikuskifti, tí tey fáa ávirkan á, hvussu framtíðar samgongur fara at síggja út.

**Sosialurin**

## Milt sagt miskilt Hans Andrias Sølvará

**RICHARD DANIELSEN**



Her er sum so einki nýtt í greinini, Dimma nr. 51 frá 13. mars. Her er bara aftur pástandur móti pástandi. Aftur verður trúttað, at Richard má boyggja seg fyri, at evangeliini eru ósamd. Men so er ikki. Richard er ikki samdur við Hans Andriasi í hasum. Tað, sum eg segði, sigi eg aftur, Lukas sigur tað upp á sín máta og Jóhannes upp á sín máta, báðir eru rættir, her er eingin ósemja.

Veruleikin er, at Jesus rópti fyrst, tað er fullgjørt og til seinast rópti hann: "Faðir í hendur tínar gevi eg anda mín."Soleiðis er hatta. Men at tað so verður fingið til, at eg, tá eg sigi soleiðis, havi ásannað, at bíblian er ikki orð Guds, so er tað milt sagt stórliga misskilt. Eg fari ongantíð, sosatt Gud hjálpir mær, at trúgva annað, enn at hon er orð Guds. Var bíblian mannaorð, var hon ikki verd pappírið, hon er skrivað á. So her verið eg noyddur at rætta teg Hans Andrias, fyri lesarans skuld, serliga fyri teir mongu lesararnar, sum bara lesa yvirskriftirnar, ella skippa skjótt ígjøgnum, teir kundu kanska trúð tær. Eg haldi ikki hatta var serliga høviskt, erlig talt. Teir sum hava lisið gjølla, vita jú, at tað havi eg ikki sagt.

Sum sagt fari eg aldri at venda mær frá trúnni á tær heilagu skriftirnar, allarminst fara Silberman og Finkelstein, sum eg nú eftir hondini kenni nakað til, at gera at so verður. Teir fara einaferð at noyðast at ásanna, at teir fóru stórliga skeivir í sínum niðurstøðum. Teir hava jú longu ásannað, ífylgi Sølvará, at teir hava kanska eina nýggja niðurstøðu í morgin. So er ikki við tí, sum eg trúgvi, Jesus Kristus er hin sami í gjár í dag og í allar ævir. Heb.13,8. Hann sigur ikki eitt í dag og annað í morgin. Til ævigar tíðir, Harri, stendur orð Títt fast í Himli, Sálmur 119,89.

Skriftirnar eru álítandi. Jesus Kristus, sum er prógvaður at vera sonur Guds við uppreisn frá deyðum, trúði skriftunum. Hann hevur sagt: "Skriftin vikast ikki." Jóh.10,35. Hann brúkti skriftirnar, tá ið hann hevði orðadrátt við teir, sum í samtíð hansara ikki trúðu á uppreisnina, saddukeararnar. Hann segði við teir: "Tit villast, tí tit kenna ikki skriftirnar." Matt.22,29. Tá ið hann bardist ein andaligan bardaga við freistaran sjálvan í oyðimørkini, rak hann hann aftur tríggjar ferðir, hvørja ferð við einum skriftstaði, Matt.4,1-11. Og tá hann undirvísti tveir lærisveinar, á ferð til Emmaus, útlegði hann frá Mósesi og frá øllum profetunum, Luk. 24,27.

Til seinast mín egni vitnisburður. Skriftirnar er tað sum eg byggi alla mína tilveru á her og í ævinleikanum. Tað er ein undurfullur friður at liggja í lívd av krossinum, ikki minst tá ið tann álvarsama stundin upprennur, vandamálið hjá øllum livandi, tá ið flytast skal inn í tað ókenda. Men fyri tí trúgvandi er tað ikki heilt ókent longur. Skriftirnar hava sett dyrnar á glopp, so vit hóma nakað av dýrdini. Vit verða biðin ikki at óttast. Hetta vildi eg, at tú mín lesari eisini skuldi hvílt í. Trúgv á Harran Jesus Kristus, so skalt tú verða frelstur. Áp. 16,31. Tí skriftin sigur jú: "Eingin, ið trýr á Hann, skal verða til skammar", Rómbr. 10,11.

Við tøkk fyri upptøkuna.

## Viðmerking til Jógvan á Lakjuni

**JÓHAN F. MAGNUSSEN**

Landsstýrismaðurin í kirkjumálum, Jógvan á Lakjuni, førdi fram á fundi hjá Felagnum fyri Kirkjuráðslimir, at tað er stór skom fyri føroyingar at útsetta yvirrtøkuna av Fólkakirkjuni.

Hann hevur helst lovað meira enn gott er yvirfyri Bertel Haarder.

Nei, Jógvan. Tað er eingin skom í tí. Danir kenna væl, hvussu seint lógarverkið í Føroyum gongur.

Vit, sum standa á síðulinjuni fáa ikki nógv innlit í tað arbeiðið, sum er farið fram hesi nýggju árini.

Eg má siga sum fyrrverandi formaður og nú kirkjuráðslimur, at vit hava fingið lítið at vita, inntil nú, tá ið bumban brast leygardagin 17/03/2007 á fundi hjá Felagnum fyri Kirkjuráðslimir.

Har kom fram, at fylgibólkurin og annað ikki riggar, sum tað skal.

Nú er so tíðin komin til at nýggjur bispur ella bispar skulu veljast. Tað kann skjótt standast stríð í Føroyum, hvar teir skulu plaserast í Føroyum.

Hvussu við kirkjunum, prestagørðunum, og allari viðlíkahaldsskipanini? Har fáa vit lítið at vita. Um tú spyrt, so er svarið, at "tað verður, sum tað verður", men tað er einki svar.

Nú eru kirkjur farnar at søkja eftir organisti í bløðunum. Organistur er ikki hvør sum helst, so tað eru nógv ógreið mál, sum skulu takast støðu til, nú kirkjan skal yvirtakast.

Nú kirkjumál eru so ógreið, er best at sleppa yvirtøkunum nú og halda fram við at gera eina føroyska kirkjulóg.

Miðvágur 19/03/07

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.